HOYVÍKSHØLLIN

Kappingarárið 2020-2021

# H71

## HEIMA Í HOYVÍK

FALDARI 2 | SUNNUDAGIN 18. OKT. 2020



adidas SMS-KAPPINGIN KVINNUR **H71-NEISTIN** KL. 14.00

BURN-KAPPINGIN MENN **H71-NEISTIN** KL. 16.00

Auto Service
BÓNUS -er biligari!
J&K
BYGMA BALSLEV
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI




Bæði kvinnurnar og menninir eru næstfremst í teimum báðum bestu deildunum – kvinnurnar enntá við fullum stigatali higartil

# KOMIN VÆL FRÁ BYRJAN

„Godt begyndt er halvt fuldent" siga danir. Hesi orð komu nokk til sín rætt, tá bæði fremstu lið okkara farna vikuskiftið greiddu setning sín og vunnu á útivølli. Kvinnurnar vunnu greiðan 32-20 sigur á VB í Vági leygardagin, og mennirnir vunnu sunnudagin 25-23 á KÍF í Kollafirði. Fýra umfør eru soleiðis spæld í grundspælinum, har hava kvinnurnar vunnið allar sínar sigrar sann-førandi, meðan mennirnir hava vunnið tríggjar av fýra dystum. Bæði liðini eru næstfremst á stigatalvunum, so sannast má, at vit eru komin væl frá byrjan.

Sum kunnugt, ræður um at verða millum fýra tey bestu liðini, tá grundspælið er liðugt, so mann

hallo·fo
nethandilin við góða úrvalinum, góðu prísunum og góðu tænastuni
www.hallo.fo – hallo@hallo.fo
Síðani 2000

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Hilmar Jan Hansen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent


BANKNORDIK
Ungdómsbankin
Njót løtuna
Lat okkum hugsa um teg
Meira enn ein banki
banknordik.fo/ungdomsbankin

kann tryggja sær sæti í hálvfinalunum. Leikt vera bert trý umfør í grundspælinum, so ráð eru ikki til at missa ov nógv stig frá byrjan. Verður illa byrjað, kann tað gerast trupult at heinta tað mista inn aftur. Men sum støðan er í løtuni, so er einki, ið bendir á, at bæði fremsta kvinnulið og fremsta mansliðið okkara ikki koma at røkka hálvfinalunum í landskappingini.

Annað er so tað, at stemningurin er sera góður kring bæði liðini. Nýggj venjingartoymi vóru jú sett til bæði liðini, og tykist tað, sum hava leikarahóparnir tikið serstakliga væl ímóti nýggju venjarum sínum. Slíkt er ikki ein sjálvfylgja.

Korona-heimsfarsóttin setur sjálvsagt sín dám á handbóltsleikárið, men ikki darvar hetta stemningin til dystirnar. Til dystin hjá fremsta liði hjá monnum í Kollafirði var fitt av áskoðarum, og hóast áskoðarar skuldu skráseta seg undan dysti, skuldu spritta seg væl tá komið var inn og farið aftur, og fólk ikki skuldu sita ov tætt, so nervaði hetta ikki dystin og karmarnar um dystin. Alt tyktist sum vanligt til dystir í Kollafirði. Høg leikferð, sera hugfangaðir áskoðarar og ikki minni sera livandi bonkurin hjá heimaliðnum, har venjarin á sín serliga hátt gav dómarunum sínar viðmerkingar við á vegnum. Alt sum vanligt. Og sum altíð ein søtur biti at vinna í slíkum heksaketli.

Heyst er og fjøllini gingin. Í „gomlu“ H71-tíðini plagdu vit tá at vera klárir at hugsavna okkum av heilum huga um hondbóltin fram til várið kom. Soleiðis er ikki í dag. Nú er hondbóltur heilársítrótt, har dagar ikki vera tiknir ímillum, um tað er vár, summar, heyst ella vetur. Fyri ein gamlan H71-viðhaldsmann vil heystið tó altíð merkja, at nú verður bert hugsað um hondbólt fram til kappingin er lokin, tá ið tað aftur fer at sumra komandi ár. Óivað liggja nógvar spennandi og sinnisupprívandi løtur fyri framman.

FISHFACTS

*Eitt klikk frá svarinum*

WWW.FISHFACTS.COM


NORÐOYA SPARIKASSI
Skalt tú keypa hús ella íbúð?
Tosa við okkum um fígging
ns.fo
Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 Fax 47 6015 ns@ns.fo


www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR
KOMMUNA


Tað besta ommaná
Forkela familjuna. Royn okkara
løskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj
vøra!
MBM

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

LAIDERZ

LBF

Dveylan reingerð

Fiska stykkið

STRANDA MÁLING

magn

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

H71

# H71

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SPEKT | løggildir grannskoðarar

PRISMA

Heini Weihe
DESIGN & CONSULT

VØRUHÚSIÐ

ADVOKATSKRIVSTOVAN

SALMON PROTEINS

ADVOKATFELAGIÐ




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN
EYÐIN DJURHUUS · JULIANNA KLETT

# VOLVO XC40



*Bilurin á myndini verður vístur við eyka útgerð







**PRÍSUR ÚR**

**398.000,-**

**+ LEVERINGSKOSTNAÐ**

**LEITAR TÚ EFTIR DREYMABILINUM?**

Hevur tú altíð droymt um ein bil, sum ikki er ov stórur, men alíkavæl rúmar nógv og har snið, tøkni, hentleikar og trygd ganga upp í eina hægri eind? – Ja, so er hetta dreymabilurin. Ger dreymin til veruleika! Kom og royn hann hjá P/F Wenzel, Volvo umboð í Føroyum.

Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00

VOLVO

**WENZEL.FO**








DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO

# Fáa fleiri HVÍLANDI LIMIR

Nú verri liggur fyri at vinna felagnum inntøkur í hesum koronutíðum, fara vit at royna at fáa fleiri hvílandi limir, sum við sínum sínum limagjaldi kunnu geva eitt íkast til raksturin hjá felagnum, sum tíbetur alla tíðina stendur í vøkstri og fær alsamt fleiri limir. Tað sigur forkvinnan í H71, Anna Dam, nú aðalfundur hevur verið í felagnum fyri kortum. Har var fíggjarstøðan í felagnum sjálvandi ein táttur, ið varð viðgjørdur.

– Í hesum sambandi hevur nevndin heitt á ein bólk av fólki at skipa fyri, at vit onkursvegna fáa fleiri hvílandi limir, tí vit vita, at vit eiga nógvar stuðlar í Hoyvík og aðrastaðni við. Yvirhøvur er korona eitt afturvendandi evni í hondbóltinum sum heild, tí fyrst sóu vit kappingina í vár verða steðgaða, áðrenn hon var liðugtspæld, tí Hondbóltssambandið ikki metti, at ráðiligt var at gjøgnumføra kappingina hjá kvinnum og monnum, sum støðan var tá. Men eisini í aðrar mátar er korona frammi í prátinum, og tá ið forkvinnan á aðalfundinum, sum var í hølum felagsins í Hoyvíkshøllini seinasta hósdagin í september, legði fram sína ársfrágreiðing, slapp hon heldur ikki undan heimsfevnandi farsóttini.

– Vit mugu bara viðurkenna, at korona eisini hevur ávirkað felagið fíggjarliga, tí orsakað av serligu umstøðunum, hevur fíggjarliga gongdin verið næstan eina hálva millión krónur skeiva vegin. Vit komu út við einum lítlum halli, so fíggjarligi parturin av rakstrinum er sjálvandi ein avbjóðing, sigur Anna Dam.

## Europeisk bjarging

Serliga, um samanborið verður við árið fyri, er munurin stórur, tí áskoðarainntøkurnar eru sjálvandi ávirkaðar av, at tað í vár ikki blivu spældar nakrar FM-finalur.

– Um vit hyggja at 2019, so spældi mansliðið heilar fimm FM-finalur, ið allar vóru sera væl vitjaðar, men tær inntøkurnar fingu vit ikki í ár, hóast menninir lógu øgiliga væl fyri at koma í FM-finalurnar aftur í ár, umframt at kvinnurnar eisini høvdu ein góðan møguleika at koma so langt, sigur forkvinnan, ið eisini nevnir aðrar inntøkur, sum ikki muna rætta vegin í ár.

– Ólavsøkan plagar at vera okkum sera góð, tá ið vit millum annað plaga at hava tombola, men ta inntøkuna mistu vit so í ár, nú ólavsøkan varð hildin á heilt annan hátt, enn vit eru von við. Sum heild gongur tað út yvir inntøkusíðuna hjá okkum, at tiltøk, ið plagdu at geva nógvar pengar, blivu av ongum í ár.

Allir pílar hava tó ikki peikað skeivan veg, og serliga gjørdi tað góðan mun, at H71 í fjørheyst fyri fyrstu ferð í søgu felagsins valdi at taka av altjóða avbjóðingini í Challenge Cup-kappingini hjá europeisku hondbóltssamgonguni, EHF.

– At vit sluppu við einum lítlum halli í roknskapinum, kunnu vit fyrst og fremst takka mongum av okkara góðu

ANNIJANNI

FOKUS 18:29

Lætt og stuttligt



## Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á – NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanki** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja okkum í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI

stuðlum fyri. Fleiri hækkaðu sín stuðul í sambandi við dystirnar hjá okkum ímóti RK Maribor Branik, umframt at dystirnir komu at kosta okkum einar 100.000 krónur minni, enn vit høvdu sett av, sigur Anna Dam.

– Ikkiminst munaði tað væl, at vit fingu báðar dystirnar spældar í Føroyum, umframt at vit tóku okkum av at gera slovensku gestunum mat og annars høvdu eina avtalu við teir um, at vit býttu útreiðslurnar javnt ímillum okkum. Tað gjørdi alt samalt, at árið fíggjarliga ikki royndist so illa, sum tað annars kundi gjørt.

## Nevndin afturvald

Sum nevnt, er limatalið í H71 støðugt vaksandi – tó at nevndin kundi hugsað sær fleiri hvílandi limir, ið kundu munað væl. Men limaviðurskiftini eru eisini ávirkað eitt sindur av støðuni, tí aðalfundurin gjørdi av at seta limagjøldini upp.

– Nú er limagjaldið fyri ungdómsliðini og fyrsta manslið 1.600 krónur og fyri kvinnurnar og annað manslið er tað 700 krónur, og so er limagjaldið hjá teimum yngru liðunum nakað lægri, sigur Anna Dam.

– Hevur onkur hug til at gerast hvílandi limur, so er tað gjaldið 600 krónur um árið, so fleiri limir vit fáa á ta kontuna, størri mun kann tað gera í felagnum, nú tað enn er torført at vinna aðrar inntøkur.

Av øðrum, ið var frammi á aðalfundinum, kunnu nevnast hallarviðurskiftini, har skotið varð upp, at tað var avgerandi at fáa ynski felagsins orðað, so greitt er, hvat H71 hevur tørv á. Millum annað varð nevnt eitt hugskot um at seta ein „hallarbólk" uttan fyri nevndina at arbeiða við hesum. Sum vant, var nevndarval á skránni, og har var sitandi nevnd afturvald, og hon sær soleiðis út: Anna Dam, forkvinna, Eyðun Joensen, næstformaður, René Dahl Olesen, Emy Sólvitsdóttir, Sonja Mørkøre, Ivan Fossabrúgv, Ann-Mari Borgarsdóttir Mouritsen, Símun Poulsen og Annika á Steig Egholm.Sum vant, var nevndarval á skránni, og har var sitandi nevnd afturvald, og hon sær soleiðis út: Anna Dam, forkvinna, Eyðun Joensen, næstformaður, René Dahl Olesen, Emy Sólvitsdóttir, Sonja Mørkøre, Ivan Fossabrúgv, Ann-Mari Borgarsdóttir Mouritsen, Símun Poulsen og Annika á Steig Egholm.







# Frítíðin byrjar umborð

Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

fk




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

januar

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

# 3 hálvleikur í Angus



**Bílegg borð á tel. 717777**

Vit svara millum kl. 11.00 og 22.00

## Vit stuðla kvinnuliðnum hjá H71



ANGUS STEAKHOUSE




Mynd: Gudmund Helmsdal

LAIDERZ

*Fokus på sportsfaciliteter*

# HOYVIKSVØLLURIN

Fyrsti FIFA QUALETY PRO góðkendur vøllur í Føroyum.

**Graslíkisslag: JUTA MASTER 40/200 á EL25**



www.laiderz.dk



VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

Alt til *HITA SANITET & VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8  Postboks 182  FR-100 Tórshavn  Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

# REINAR TENN BRENNA IKKI



J&K

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25



HIDDENFJORD®

Burðardyggur havbúnaður

www.HiddenFjord.com

P/F Luna, FO-510 Gøta • tel 662100 • luna@luna.fo



## Visti tú at...

Vit ala á harðbalnum økjum fyri ikki at dálka umhvørvið.

Vit skapa og menna heimsins mest burðardyggu mannagongdir at ala laks.

HiddenFjord laksur svimur úr sjónum til góðskingarvirkið fyri ikki at gerast strongdur.



HiddenFjord laksur livir í einum av heimsins reinastu høvum við røttum sjóvarhita. Hetta er natúrliga umhvørvið hjá villa atlantiska laksinum.

Vit leggja stóran dent á at ala ein natúrligan laks uttan antibiotika og hormonir.

HiddenFjord laksur smakkar sera væl og er stak heilsugóður.

# KUNDI KANSKA REGNAÐ MINNI...

Tá ið tað gjørdist greitt, at hvørki Annika Fríðheim Petersen ella Vár Thomsen fóru at vera tøkar í málinum hjá H71-kvinnunum í vetur, varð somuleiðis greitt, at neyðugt var við styrki onkursvegna, nú enn eitt avbjóðandi kappingarár stóð fyri framman. Men tá ið kappingin byrjaði, var ein danskur/týskur avloysari at finna í málinum.

Talan er um 22 ára gomlu Miu Julius, sum er fødd og uppvaksin í Flensburg. Tað er triðstørsti býurin í norðasta týska statinum, Schlesvig-Holstein, har millum annað ein danskur minniluti húsast og har danskt er viðurkent minnilutamál.

– Eg havi bæði danskan og týskan ríkisborgarskap, og eri vaksin upp við bæði donskum og týskum máli rundan um meg, greiðir Mia frá.

– Hondbóltsliga kennist eg sjálvandi við stórfelagið Flensburg Handewitt, hóast eg ongantíð sjálv havi spælt har, men eg havi sæð nógvar dystir og tí eisini fingið nógvan íblástur haðani. Og sum eg skilji, hava eisini onkrir ungir spælarar úr Hoyvík verið í felagnum.

### Púra óvæntað

At hon hetta kappingarárið skuldi spæla í Føroyum, lá líkasum ikki í kortunum hjá henni, tí hon hevur hetta seinasta árið verið undir útbúgving sum fysioterapeutur í Odense, og tað bar líkasum ikki til bara at kvetta við tað fyri at fara til Føroya at spæla hondbólt.

– Og tó, so vísti tað seg, at tað kundi lata seg gera allíkavæl. Eg hevði valið ímillum at taka við hesum nýggja møguleikanum, at verja málið hjá H71, ella at velja ta tryggu loysnina, sum var at halda fram í Danmark. Tað var eitt val, tí so útbúgvingin er av slíkum slagi, eg at ikki kann lesa á netinum, sigur Mia Julius.

– Eg valdi so at royna lukkuna í Føroyum í eitt ár, men gjørdi tað tó í samráð við mín lestrarvegleiðara. Um eg vil halda fram at lesa eftir hetta eina árið í Føroyum, skuldi einki verið til hindurs fyri tí, men sá má eg í øllum førum søkja inn umaftur. Og tað skuldi ikki verið nøkur forðing.

Sum so ofta, so gjørdist eftir regluni um, at „onkur kennir onkran, sum kennir onkran", ið gav Miu møguleikan hjá H71.

– Tað vísti seg, at Carsten Thomsen hevði niðri í Danmark havt eitt lið saman við mínum gamla venjara, og tá ið teir so tosaðu um, at Carsten nú skuldi til Føroya at venja H71-kvinnurnar og manglaði ein málverja, gjørdist tað tann vegin, at eg fekk møguleikan, greiðir málverjin frá.

– Nú skal eg so venja meg við føroyska hondbóltin, sum er á einum eitt sindur hægri stigi, enn eg eri von við. Fleiri av liðunum, sum vit hava spælt ímóti, hava góðar skjúttar, og yvirhøvur eru fleiri gjøgnumbrot og avslutningar á strikuni, enn eg eri von við, so tað skal eg venja meg við.

Mia Julius sigur, at higartil hava tær vunnið sínar dystir rímiliga trygt, so trýstið hevur ikki verið so øgiliga stórt, men at hon væntar meira trýst á teir komandi dystirnar. Og hon heldur, at dysturin hesaferð og teir næstu eru av slíkum slagi, at teir allir hava týdning fyri gongdina hjá H71.

### Málslig avbjóðing

– Eitt annað, sum er heilt øðrvísi, enn eg eri von við, er ungi aldurin á liðnum. Eg plagdi at vera millum tær yngstu, men nú teljist eg næstan millum tær elstu, og av málverjunum hjá H71 eri tann elsta.



Men tað er bara stuttligt at royna tað eisini, sigur Mia, ið annars nevnir tað málsliga sum eina eyka avbjóðing.

– Í mínum samskifti við verjuna haldi eg meg til danskt, tí tað skilja tær allar, og sum frálíður skilji eg eisini tað, sum tær siga. Hetta er jú hondbóltur, so eg kann eisini rokna tað nógva út, men eg læri alla tíðina, og tað haldi eg eisini vera ein týðandi part av tí at vera her, at eg kann læra málið.

Fryntligi málverjin letur bara væl at móttøkuni, hon hevur fingið, tí fólk hava bæði verið fitt og blíð. Ikki minst fegnast hon um arbeiðið, hon hevur fingið í einum barnagarði, tí tað kann hon veruliga brúka til nakað.

– Eisini har er málið ein avbjóðing, tí eg fái ikki nakra undirvísing í føroyskum, men børnini eru fínir lærarar, so eg læri í heilum nýggj orð. Fleiri av teimum duga ikki danskt, so vit mugu bara royna at finna út av tí, og tað ger, at eg læri eina rúgvu, sigur Mia Julius, sum fyribils tekur hetta árið sum eitt lítið ævintýr.

– Higartil havi eg ivaleyst at síggja til við bæði arbeiði og venjing, so eg keði meg ikki. Her er eisini so sera vakurt, at hevði tað bara verið eitt lítið sindur minni av regni, hevði tað verið heilt fullkomið, leggur hon aftrat við einum fittum skálkabrosi.


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**

# Bussar til øll endamál

Í Føroyum og uttanlands







Loysnir 214452

M B

**MOURITSEN´S BUSSAR**

Tel 32 21 21 · mb@mb.fo


Ring 31 45 55
SKELTI
PRENT
PAPPÍR
Sjálvandi
Føroyaprent
LANDSINS STØRSTA PRENTSMIÐJA
Føroyaprent


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar

FAROE SHIP


Keyp vetrardekkini
hjá okkum.
Helst bestu prísir í landinum ...
WAAG
Tel. 613666
VREDESTEIN


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip



*Henriette Mikkelsen, sum var ein av stóru stjørnunum á danska hondbóltslandsliðnum, sum hon vann OL-gull og EM-silvur við í 2004, hevur um vikuskiftið skeið í Hoyvíkshøllini saman við manni sínum, Mads Møller, sum er dugnaligur og avhildin venjari*

# OL-VINNARI LÆRIR FRÁ SÆR

Um vikuskiftið er Hoyvíkshøllin karmur um eitt serligt skeið fyri vengur á A-landsliðnum og ungdómslandsliðunum á kvinnusíðuni. Skeiðið er liður í einum átaki hjá Hondbóltssambandinum at varpa ljós á og menna teir serligu førleikar, ið krevjast til ymsu plássini á hondbóltsvøllinum.

Á skeiðnum, sum er fríggjakvøldið og fyrrapartin leygardagin, fara tvey fólk úr Danmark at greiða frá og læra frá sær. Tey eru fyrrverandi danski landsliðsspælarin og OL-vinnarin, Henriette Mikkelsen, og maður hennara, Mads Møller, sum er sera dugnaligur og nógv avhildin venjari.

Henriette Mikkelsen spældi í árunum frá 2002 til 2008 tilsamans 81 dystir á danska landsliðnum og skjeyt 346 mál, og hon var við til at vinna OL-gull og EM-silvur í 2004.

Á skeiðnum verða fyrilestrar, venjing og samrøður um hvussu og hvat skal til fyri at gerast ein góður vongur. Hondbóltssambandið hevur boðað frá, at áhugað annars kunnu vera við til bæði fyrilestrar og venjingar.

Venjingar eru á skránni báðar dagarnar, men úr skránni kann nevnast, at fríggjadagin hevur Henriette Mikkelsen fyrilestur um lívsleið sína í hondbólti og leygarmorgunin greiðir Mads Møller frá um menning av vengrum, teknisk krøv og annað.

## H71

1 MIA **JULIUS**
16 FÍA **W. POULSEN**

2 ELSA **EGHOLM**
3 SILJA **SÁMALSDÓTTIR**
4 BRYNHILD **PÁLSDÓTTIR**
6 BJØRK **BRIMNES**
7 MARIA **HALSDÓTTIR WEYHE**
8 KARINA **EYSTURTÚN RUBEKSEN**
9 MARITA **MORTENSEN**
10 EVA BARBA **ARGE**
13 INGA MARIA **JOENSEN**
14 SUNNIVA **BOGADÓTTIR**
15 VÁR **BENTSDÓTTIR ZACHARIASSEN**
17 LÍV **BENTSDÓTTIR ZACHARIASSEN**
18 ELISABETH **HOLM SIMONSEN**
20 CHRISTINA **TURIÐARDÓTTIR ARGE**
24 BIRITA POULINA **MORTANSDÓTTIR**
31 SÁRA **JACOBSEN**
77 JANA **MITTÚN**

**VENJARI:** CARSTEN THOMSEN
**HJÁLPARVENJARI:** HALLUR DANIELSEN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**LIÐLEIÐARI:** ANDRAS MARR POULSEN

## NEISTIN

1 MARGIT **WEIHE**
16 MONA **DAM POULSEN**

2 HJØRDIS **VIÐSTEIN**
4 HERVØR **NICLASEN**
7 BARBARA **JOHANNESEN**
8 GUNNRIÐ **POULSEN**
9 SÓLBJØRT **HØJ**
10 MARJUN **DANBJØRG**
13 BRYNJA **HØJ**
14 KATRINA **MORTANSDÓTTIR**
15 INGUN **KRISTINA PERSSON**
17 FRIDA **HOLM JACOBSEN**
18 RÚNA **LARSEN**
19 STINA **MADSEN**
28 RAKUL **VANG**

**VENJARI:** KÁRI HORN
**HJÁLPARVENJARI:** FLEMMING RABEN



### SMS-kappingin

| Nr. Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. Kyndil | 5 | 145 | 101 | 44 | 10 |
| **2. H71** | **4** | **136** | **100** | **36** | **8** |
| 3. Neistin | 4 | 107 | 87 | 20 | 6 |
| 4. StÍF | 5 | 136 | 153 | -17 | 2 |
| 5. VÍF | 4 | 99 | 119 | -20 | 2 |
| 6. VB | 4 | 86 | 112 | -26 | 2 |
| 7. Stjørnan | 4 | 89 | 126 | -37 | 0 |

FM-endaspæl

## H71

1 ÁRI **DAM**
12 JÁKUP **N. THOMSEN**

2 SVEINUR **OLAFSSON**
3 HALLUR **BISKOPSTØ**
4 PETER **KROGH**
5 BOGI **DAVIDSEN**
8 PÆTUR **THOMSEN**
10 DJÓNI **GAARD JOENSEN**
11 HANS KÁRI **HANSEN**
14 SIGMUNDUR **DAHL**
18 SAKIR **TRÓNDARSON FRÝDAL**
19 BALDUR **GILLASON**
24 NIKLAS **HØJGAARD HANUSARSON**
28 RÓI **ELLEFSEN Á SKIPAGØTU**
71 BOGI **HANSEN**

**VENJARI:** SIMON OLSEN
**HJÁLPARVENJARI:** PETUR MITTÚN
**HJÁLPARVENJARI:** HALGIR DAHL OLESEN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**LIÐLEIÐARI:** ARI JÓGVANSSON

## NEISTIN

1 JÓN **Á ARGJABOÐA**
12 RÓKUR **M HOLM JOENSEN**

32 BENCE **GÖDÖR**
3 KARL **MARTIN OLSEN**
4 TORKIL **HENTZE**
5 JOHANNES **KRAGESTEEN**
6 JÓNSVEIN **DULAVÍK**
7 HANUS **ÁRASON**
8 JÓNAS **RASMUSSEN**
9 TEITUR **MAGNUSSON**
11 HERBJØRN **LAVA**
14 BJARTUR **HANSEN**
20 FINNUR **HANSSON**
21 PAULI **HØJ**
22 JULIAN **KRAGESTEEN**
27 JOHN RÓI **TORFINNSSON**
42 RASMUS **SØBY**
47 JOHANNES **BJØRGVIN**

**VENJARI:** ARNAR GUNNARSSON
**HJÁLPARVENARI:** BARTAL KAMBAN



### Burn-kappingin

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Neistin | 5 | 158 | 133 | 25 | 9 |
| **2.** | **H71** | **4** | **113** | **91** | **22** | **6** |
| 3. | VÍF | 4 | 116 | 108 | 8 | 5 |
| 4. | KÍF | 5 | 112 | 110 | 2 | 4 |
| 5. | Team Klaksvík | 4 | 91 | 94 | -3 | 4 |
| 6. | StÍF | 6 | 148 | 173 | -25 | 4 |
| 7. | Kyndil | 6 | 125 | 154 | -29 | 2 |

FM-endaspæl

betri

NÚ 1,75%

# Vit **lækka rentuna** á orkuláninum

## Skalt tú bjálva, umbyggja ella skifta vindeygu?

**Fyrimunir við orkuláni og grønari orkuloysn:**

- ✓ Minka um tína orkurokning
- ✓ Økja um virðið á húsunum
- ✓ Minka um CO2-útlátið

**Ring 348 000**
og fá eitt prát um orkulán

betri.fo/**orkulan**

